## FM-finalur um vikuskiftið

Leygardagin verða FM-finalurnar í flogbólti fyri yngru deildirnar spældar í flgobólti. Finalurnar verða á Tvøroyri, og nógv verður gjørt burturúr, soleiðis at umstøðurnar verða optimalar. Spælt verður á taraflex-gólvinum, sum vanliga verður nýtt í steypafinalunum. Og fremstu føroysku dómararnir skulu døma dystirnar. Fystu finalurnar verða spældar klokkan 10, a Tba og TBb spæla í dreingir 14. Hinar finalurnar eru: Gentur 14, Tba-Fleyr, mansunglingur, ÍF-SÍ og í finaluni hjá kvinnuunglinum spæla TB og KÍF.



## Sammetur Danmark og Føroyar

Morten Olsen sigur við danska BT, at tað er bara gott fyri danskan fótbólt, at bestu spælararnir fara uttanland. – Tað er ein náttúrlig prosess, at vit menna okkara talentir og senda teir uttanlands at spæla. Tað er eins náttúrligt, sum at Føroyar senda sínar bestu spælarar til Danmarkar, sigur Morten Olsen, sum um vikuskiftið var í júst Føroyum.

# Tættar finalur

**Tá tosað verður um manshondbólt, so kemst ikki uttanum, at tosa um Kyndil og VÍF, ið hava vunnið eina rúgvu av meistaraheitum. Næst teimum koma Neistin og StÍF, við fimm meistaraheitum hvør. Tað eru eisini júst Neistin og StÍF, sum í morgin fara at dystast í fyrstu finaluni, og spennandi verður at fylgja hesum tøttu liðum**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Í 40-árunum vóru strandingar ein styrki í føroyskum manshondbólti, og seinastu árini hava teir aftur av álvara bitið seg fastar í oddastríðið, á nærum hvørjum ári.

### Havnin og Vestmanna

Enn er er bert talan um dominans frá tí grøna liðnum úr Havn, og teimum gulu úr Vestmanna. Liðini hava ávíkavist vunnið 30 og 21 meistaraheitir, og eitt fitt lop er niður til nummar trý á listanum, ið eru Neistin og StÍF við fimm meistaraheitum hvør.

So tað verður ikki talan um broyting í dominansinum við bræði.

### Kappingarárið hjá finalistunum

Fyrstu fimm dystirnar í hesum kappingarárinum vóru Neistanum sera góðir, og vunnu teir allar. Men so kom kuril á tráðin, og vend kom í hjá havnaliðnum. Tá Neistin byrjaði at trilva, tá byrjaði StÍF at taka yvir, og teir hava ikki steðga síðan. Teir hava til tíðir víst ræðandi styrki, og hyggur man eftir stigatalvuni, so hava teir besta álop í landinum, umframt at teir hava bestu verjuna eisini.

Hendan sannroynd hevur vunnið teimum fremsta plássið í deildini, og við tí, eisini rættin til at áseta, hvar fyrsta finalan skal spælast. Harafturat hevur oddaliðið eisini heimadystarfyrimun, í einari møguligari triðju finalu.

### Sera jøvn lið í finaluni

Av teimum fýra dystunum, Neistin og StÍF hava spælt innanhýsis í kappingarárinum, hevur Neistin vunnið tveir, meðan StÍF hevur vunnið tveir. Samlaði málmunurin í hesum dystum er eisini javnur. StÍF hava bert trý mál fleiri, og føra 117-114, tá øll innanhýsis mál eru tald við. Merkisvert er eisini, at beint undan finaluni leggjast fleiri leikarar á báðum liðum við sjúku, og til dømis mangladu heili nýggju leikarar á Neistaliðnum til seinasta innanhýsis dystin.

Líkamikið hvat, so eru Áki Mørk og Leivur Justinussen samdir í, at menn nokk skulu megna at bíta pínuna í seg, og spæla av fullum hjarta.




*Av teimum báðum liðunum í FM-finaluni í ár, má sigast, at trupult er at útnevna nakran til favoritt. Liðini hava møtt hvør øðrum fýra ferðir í landskappingini í ár, og hava vunnið ein dyst hvør á heimavølli, og ein dyst hvør á útivølli. Hendan sannroynd ger, at tað er nærum ógjørligt at kalla nakran sum favoritt, hóast StÍF hava spælt serstakliga væl, meginpartin av kappingarárinum*

## Áki Mørk

**Vit fara als ikki at bakka**
Áki Mørk sigur at teir í Neistanum als ikki ætla sær at bakka fyri StÍF, og hóast tað bert er tríggir leikarar á liðnum, ið hava roynt at staðið í einari finalu áður, so metir hann at menn fara at reisa seg og kempa.

*Hvat er lykilin til sigurin móti krútsterka liðnum hjá strandingum?*
- Vit skulu bara spæla okkara egna spæl, og hugsa um tað, vit duga best, og so bara gera tað.

*Er hetta nakað, tit hava lært frá Ulriki Wilbæk, tá hann var og vandi tykkum, á vári 2006?*
- Ja, Ulrik lærdi okkum at fokusera uppá tað positiva í okkara egna spæli, í staðin fyri at stara okkum blindar uppá, hvat mótstøðuliðið megnar. Hetta hava vit roynt at gjørt síðan, haldi eg.

*Hvussu er hópurin fyri hjá tykkum, hvat skaðum og øðrum viðvíkur?*
- Vit hava bert eitt leikbann, og hesaferð verður tað Karl Herup Olsen, ið ikki verður tøkur. Annars hava vit verið hart raktir av sjúku, og til dømis kann nevnast, at tá vit spældu á Skála seinast, tá vóru heili nýggju leikarar burtur vegna sjúku. Men tað skal ikki vera nøkur sjúka, ið skal steðga okkum í at levera ein kanón innsats, sigur Áki Mørk, ið er tøkur aftur eftir leikbann.

## Leivur Justinussen

**Ongin serstøk upptakt til finaluna**
Vit fingu orðið á Leiv Justinussen hjá StÍF, og Áka Mørk hjá Neistanum, um vónir teirra til FM-finalurnar, sum verða spældar í morgin.

*Nú hava tit, fyri langari tíð síðan vunnið tykkum finalusessin til FM, eru tit stórfavorittar?*
- Nei, eg haldi avgjørt ikki, at vit eru at rokna sum favorittar í finaluni. Ein finala er nakað heilt serligt, og har kann alt henda, so eg vil ikki siga at vit eru favorittar undan finaluni. Tað verður ein spennandi finala.

*Fyrireika tit tykkum á nakran serligan hátt?*
- Nei, vit hava gjørt, sum vit altíð plaga at gera. Vit hildu tað ikki vera skilagott, um man kanska fór at gera nakað nýtt nú. Tað hevði kanska bara givið okkum nervar, og tað er óneyðugt høvurbrýggj.

*Hvussu er hópurin fyri hjá tykkum, hvat skaðum og øðrum viðvíkur?*
- Vit hava verið inni í einari óhepnari tíð. Nógvir mans hava ligið sjúkir, og sum eg skilji á lagnum, hava Neistamenn eisini drigist við sjúku. So eisini har eru vit javnt stillaðir, sigur Leivur Justinussen, ið gleðir seg til at tørna út móti Neistanum í morgin.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

Sunset-kappingin

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 20.03 | 15.00 | Stjørnan-Neistin |
| 22.03 | 15.00 | Stjørnan-Neistin *) |

Atlantic Airways-kappingin

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 20.03 | 19.00 | Neistin-StÍF |
| 22.03 | 16.00 | StÍF-Neistin |
| 24.03 | 16.00 | StÍF-Neistin *) |

### Fótbóltur

Kappingin um Løgmanssteypið

| Dagur | Dystur |
|---|---|
| 20.03 | EB/S-NSÍ |
| 20.03 | VB/S-AB |
| 20.03 | ÍF-HB |
| 20.03 | Fram-KÍ |
| 20.03 | TB-MB |
| 20.03 | B36-Skála |
| 20.03 | 07 Vestur-Víkingur |
| 20.03 | B71-B68 |
| 24.03 | 07 Vestur/Víkingur-B36-Skála |
| 24.03 | B71/B68-VB/S/AB |
| 24.03 | EB/S/NSÍ-Fram/KÍ |
| 24.03 | ÍF/HB-TB/MB |

**) Bert um neyðugt er við trimum finaludystum*